# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Talentini svumu um vikuskifitð



**Svimjisambandið skipaði fyri talentlandsliðsvenjing, fyrsta vikuskifti í desember. Úr øllum føroyum stevndu 29 svimjarar til Klaksvíkar, har tey høvdu tríggjar venjingar**

SVIMJING
*Tíðindaskriv*

Umframt sjálvar venjingarnar, fingu svimjararnir eisini ein fyrilestur við Lívar Nysted, ið greiddi frá hvussu ein menti sær sum einstaklingur og setti sær mál. Eisini var okkurt at stytta sær stundir við og var alt liðið í Atlantis bio, til eina hugnaliga løtu. Hesi 29 svimjarar vóru í aldrinum 11 til 16 ár og vóru 21 gentur og 8 dreingir úttiknir.

### Skipað talentarbeiðið

Henda venjingarlega var fyrsta stig í einum skipaðum unglingaarbeiðið hjá Svimjisambandinum og eru vónirnar stórar til hesi ættarliðini. Svimjisambandið fer í januar at leggja skrá og úttøkutreytr fram til øll landsliðini hjá sambandinum.

***Svimjararnir á venjingarleguni vóru, úr Ægir:*** *Monika Biskopstø, Alvi Hjelm, Cecilia Eysturdal, Bjarni M. Petersen.* ***Úr Reka:*** *Turið Christiansen, Heðin L. Olsen.* ***Úr Fuglafjarðar Svimjifelag:*** *Hildur á Fløtti, Poula Ø. Mohr, Jóhanna Egholm, Jónfríð Hansen, Jóhann Heðinsson, Óluva Jacobsen, Jonna B. Thomsen.* ***Úr Svimjifelagnum Flot:*** *Astrid Foldarskarð, Birita Debes, Tróndur Olsen.* ***Úr Havnar Svimjifelag:*** *Bjørg Seloy, Dagmar M. Winther, Guðrun H. Jacobsen, Kristina Eliasen, Annika S. Olsen, Magnus Jákupsson, Ólavur S. Petersen.* ***Úr Suðuroya Svimjifelag:*** *Helena Strøm Sævarsdóttir, Katarina S. Lamhauge, Jón Hofgaard, Sára Müller, Tanja Skaalum, Guðrun Mortensen.* ***Venjarar vóru:*** *Jóhan Martin Poulsen og Rúni Gaardbo. Leiðari var Jórun Eið Johannsen.*

# Norðurlendska ljóspunktið

**Meðan allar grannatjóðir okkara gingu aftur á FIFA-listanum í ár, hevur føroyska fótbóltslandsliðið tikið seg fram**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Føroyar eru einasta norðurlendska fótbóltstjóðin, sum hevur upplivað framgongd í 2008.

Føroyska liðið var nummar 194 av øllum FIFA-tjóðunum, tá seinasti listin fyri 2007 varð kunngjørdur, men nú eru fótbóltsharrar okkarar komnir upp á nummar 184. Fyrst og fremst takkað verið javnleikinum móti Eysturríki.

Hinvegin gonst einki serligt hjá grannatjóðum okkara.

Svøríki, sum er fremsta norðurlandið á listanum, er nú nummar 32, og tað er fyrsta ferðin, síðani byrjað varð við listanum í 1993, at Svøríki ikki telist millum 30 tær bestu fótbóltstjóðirnar í heiminum.

Danmark er nú at finna sum nummar 37, Finnland er nummar 55 og Noreg er dottið heilt aftur í 59. plássið. Eisini í Íslandi er talan um afturgongd, og er Ísland nú nummar 83.

**Top-10**
*(Í klombrum plaseringin fyri november)*

| | |
|---|---|
| 1 | Spania (1) |
| 2 | Týskland (2) |
| 3 | Holland (4) |
| 4 | Italia (3) |
| 5 | Brasil (5) |
| 6 | Argentina (6) |
| 7 | Kroatia (7) |
| 8 | Ongland (10) |
| 9 | Russland (8) |
| 10 | Turkaland (13) |

## FCK vann seg víðari

Ein sigur var kravið, um FCK eisini skuldi spæla europiskan fótbólt til várs, og hetta livdu teir í høvuðsstaðarfelagnum upp til, tá teir í gjárkvøldið tóku móti blegiska Club Brügge.

Vertirnir høvdu leikliga yvirvág fyri tað mesta, og teir skaptu eisini onkran heilt góðan møguleika tíðliga í dystinum. Men tað gekk nærum ein tími, áðrenn Cesar Santin skoraði avgerandi málið. Hetta tá hann stóð blankur við returbólti.

Málið noyddi belgisku gestirnar fram á vøllin, men hóast stórt trýst, so megnaðu teir ikki veruliga at skapa sær nakrar málmøguleikar seinasta hálva tíman.

**-mørk**

## Hvør er Bendtner?

Týsdagin skrivaði italienska ítróttarblaðið La Gazzetta dello Sport, at Nicklas Bendtner skuldi loysa av Adriano í Inter. Men leiðslan í stórfelagnum kennist ikki við danska framherjan.

- Bendtner, hvør í allari víðu verð er tað? Lurta nú, vit eru oddalið í Seriu A. Hví skuldu vit verið áhugaðir í einum leikara, sum vit ikki kennast við, sigur Paulo Viganó, umboð frá Inter.

**-uni**

## Stórskjútti til Onglands

Fleiri ensk feløg sigast nú dyrgja eftir eysturríkska Marc Janko. Hann var annars ikki partur av eysturríkska hópinum í EM-endaspælinum í summar, men higar til hevur hann skotið 30 mál í 22 dystum í heimligu kappingini.

Fyrr hevur Chelsea víst áhuga fyri spælaranum, men enskir miðlar meta, at tað í løtuni er meira sannlíkt, at Janko fer til Tottenham, Middlesbrough ella Blackburn.

**-mørk**